SAMHALDSFASTI
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin



# ÁRSFRÁGREIÐING 2025

Um grunnin 2
Inngjald 2
Útgjald 2
Fæið 4
Fyrisiting 6
Framtíðarútlit 6
Leiðsluátekning 7
Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara 8
Upplýsingar um grunnin 11
Nýttur roknskaparháttur 12
Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2025 15
Fíggjarstøða tann 31. desember 2025 16
Fíggjarstøða tann 31. desember 2025 17
Notur til ársfrásøgnina 18

## Um grunnin

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 við seinni broytingum. Endamálið við grunninum er at tryggja øllum íbúgvum í Føroyum eina arbeiðsmarknaðareftirløn.

Eitt stýri við trimum limum fyrisitur Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Nýtt stýrið er valt 1. apríl 2025. Stýrið er valt fyri trý ár í senn. Stýrislimirnir eru:

- Malan Johansen, forkvinna
- Kristoffur Laksá, umboðar arbeiðsgevararnar
- Elin Sørensen, umboðar arbeiðstakararnar

Í 2025 hevur stýrið havt fimm stýrisfundir. Stýrið fylgir við avkastinum av fænum og umrøður hetta á hvørjum fundi. Einaferð um árið gjøgnumgongur stýrið eisini íløgur og váðar nágreiniliga. Á fundinum í juni viðgjørdi stýrið roknskapin, og í september varð avgerð tikin um útgjaldið fyri 2026.

## Inngjald

Fæið í Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum kemur av, at allir persónar undir pensjónsaldur og allir arbeiðsgevarar rinda inn í grunnin. Sambært lógini fyri grunnin umsitur TAKS inngjøld í grunnin.

Inngjaldið frá persónum er eitt prosenttal av árligu skattskyldugu inntøkuni. Arbeiðsgevarar rinda eitt prosenttal av útgoldnum A-inntøkum.

Talva 1 vísir, hvat inngjaldið hevur verið í prosent av lønini síðan grunnurin varð settur á stovn. Inngjaldið er hækkað fleiri ferðir, og frá 2019 er tað 3%. Munur hevur tó ongantíð verið millum inngjaldið hjá arbeiðstakarum og arbeiðsgevarum.

| Ár | Inngjald arbeiðsgevari | Inngjald arbeiðstakari |
|---|---:|---:|
| 1992 - 2004 | 0,50% | 0,50% |
| 2005 | 0,75% | 0,75% |
| 2006 | 1,00% | 1,00% |
| 2007 | 1,50% | 1,50% |
| 2008 - 2015 | 1,75% | 1,75% |
| 2016 - 2017 | 2,25% | 2,25% |
| 2018 | 2,50% | 2,50% |
| 2019 - | 3,00% | 3,00% |

*Talva 1 –Inngjaldsprosent í AMEG*

Talva 2 vísir inngjøld frá arbeiðstakarum (løntakarum) og arbeiðsgevarum tilsamans í krónum síðan 2010. Inngjøldini í 2025 vóru tilsamans 819 mió. kr., sum er 5,8% hægri enn árið fyri.

## Útgjald

Regluligar útgjaldingar til pensjónistar úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum byrjaðu 1. apríl 1997. Grunnurin hevur, sambært heimild í lóggávuni, gjørt avtalu við TAKS um, at TAKS umsitur útgjaldingarnar úr grunninum.

Talva 2 vísir, at samlaða útgjaldið í 2025 var 728 mió. kr., sum er 2,1% meira enn fyri 2024.

Talva 3 vísir mánaðarliga útgjaldið, frá 1997 til 2026, til ein pensjónist. Útgjaldið er vaksið úr 500 kr. um mánaðin upp í 6.650 kr. um mánaðin í 2026. 6.650 kr. svarar til fult útgjald. Fyri pensjónistar búsitandi í Føroyum er kravið fyri at fáa fult útgjald, at tey hava búð í minsta lagi 15 ár í Føroyum, frá 15 ára aldri til pensjónsaldur.

Fyri pensjónistar búsitandi uttanlands er kravið fyri at fáa fult útgjald, at tey hava búð í minsta lagi 40 ár í Føroyum millum 15 ár og pensjónsaldur.

Tað er ætlanin hjá Fíggjarmálaráðnum at broyta lógina fyri AMEG, soleiðis at eisini í Føroyum verður kravið, at persónur skal hava búð í 40 ár, millum 15 ár og pensjónsaldur, fyri at fáa fult útgjald. Lógaruppskotið var komið niðan í tingið fyrst í 2026, men fall burtur, tí val varð útskrivað. Væntandi verður uppskotið lagt fyri tingið aftur í komandi tingsetu.

| Ár | Inngjøld mió. kr. | Útgjøld mió. kr. |
|---|---:|---:|
| 2010 | 255 | 200 |
| 2011 | 262 | 215 |
| 2012 | 269 | 227 |
| 2013 | 276 | 239 |
| 2014 | 287 | 253 |
| 2015 | 304 | 268 |
| 2016 | 403 | 356 |
| 2017 | 429 | 384 |
| 2018 | 493 | 449 |
| 2019 | 625 | 568 |
| 2020 | 646 | 600 |
| 2021 | 659 | 628 |
| 2022 | 690 | 648 |
| 2023 | 737 | 675 |
| 2024 | 774 | 713 |
| 2025 | 819 | 728 |

*Talva 2 – Inngjøld og útgjøld AMEG*

Tey, sum ikki uppfylla kravið um fult útgjald, kunnu kortini hava rætt til brotpensjón. Fyri at fáa útgjald úr AMEG, er kravið at viðkomandi hevur búð í Føroyum í minst trý ár millum 15 ára aldur og pensjónsaldur. Býr pensjónisturin uttanlands, fær pensjónisturin 1/40 av fullum útgjaldi, fyri hvørt árið hann hevur búð í Føroyum, tó í mesta lagi fyri 40 ár. Býr pensjónisturin í Føroyum, fær hann 1/15 av fullum útgjaldi fyri hvørt árið, hann hevur búð í Føroyum, tó í mesta lagi fyri 15 ár.

Í desember 2025 var talið av pensjónistum, sum fingu pensjón frá AMEG 10.150. Av hesum búðu 1.182 uttanlands. 1.082 fingu brotpensjón, tað vil siga ikki fulla pensjón. Av hesum 1.082 persónunum búgva 1.026 uttanlands, og 56 búgva í Føroyum.

| Ár | Upphædd | Ár | Upphædd |
|---|---|---|---|
| 1997 | 500 | 2012 | 2.770 |
| 1998 | 525 | 2013 | 2.850 |
| 1999 | 560 | 2014 | 2.930 |
| 2000 | 595 | 2015 | 3.010 |
| 2001 | 620 | 2016 | 3.910 |
| 2002 | 650 | 2017 | 4.065 |
| 2003 | 680 | 2018 | 4.545 |
| 2004 | 700 | 2019 | 5.590 |
| 2005 | 910 | 2020 | 5.740 |
| 2006 | 1.185 | 2021 | 5.865 |
| 2007 | 1.860 | 2022 | 5.955 |
| 2008 | 2.230 | 2023 | 6.070 |
| 2009 | 2.500 | 2024 | 6.325 |
| 2010 | 2.600 | 2025 | 6.455 |
| 2011 | 2.690 | 2026 | 6.650 |

*Talva 3 – Mánaðarligt útgjald*

## Fæið

Samlaða inngjaldið í grunnin, tilsamans, er størri enn útgjaldið (sí talvu 2 omanfyri). Til dømis vóru inngjøldini í 2025 91 mió. kr. hægri enn útgjøldini. Tað vil siga, at henda upphæddin var afturhildin í grunninum. Orsøkin til, at pengar vera afturhildnir, er, at talið av pensjónistum fer at vaksa næstu árini. Sambært Almannaverkinum vóru tað um 8.500 pensjónistar, sum fingu útgjald 2024, og sambært fólkatalsframrokningini hjá Hagstovuni verður talið av fólkið 68 ár og eldri gott 11.600 í 2040 og um 14.000 í 2060.

Fyri at sleppa undan at lækka mánaðarliga útgjaldið er tí neyðugt at spara upp til vaksandi talið av pensjónistum.

Burtursæð frá tøka gjaldførinum til dagliga raksturin er øll fíggjarognin sett í virðisbrøv. Fæið verður røkt eftir íløguheimild frá stýrinum. Íløguheimildin svarar til kunngerðina um røkt av fænum.

Í 2025 vóru 29,0% av virðisbrævaognini altjóða partabrøv, 0,7% donsk statslánsbrøv, 41,0% donsk realkredittlánsbrøv, 14,0% altjóða virkislánsbrøv og menningarlandalánsbrøv og 13,5% alternativar íløgur og onnur útlán. Virðisbrævaognin sæst í talvu 4 niðanfyri. Talan er um miðaltøl fyri árið.

Samanumtikið vóru virðisbrævaavkast góð í 2025. Altjóða partabrøv góvu eitt avkast á 7,5% tilsamans. Tøknigeirin var ein týðandi drívmegi, og serliga ávísar stórar fyritøkur í geiranum stóðu fyri einum munandi parti av samlaða avkastinum. Hetta er framhald av einari gongd, sum hevur verið seinastu árini, har vøkstur og avkast í vaksandi mun savnast á einstøkum feløgum. Gjaldoyragongdin hevði eisini ein týðandi leiklut fyri samlaða úrslitið, tí amerikanski dollarin viknaði munandi samanborið við evropeisk gjaldoyru. Hetta hevði við sær, at avkastið fyri evropeiskar íleggjarar varð nakað lægri, enn tað annars hevði verið, um gjaldoyru vóru óbroytt, og vísir hetta gjaldoyraváðan í altjóða íløgum.

Á lánsbrævamarknaðum var gongdin meira tvíbýtt. Stuttar rentur fullu tíðliga í árinum, stuðlað av væntanum um lækkingar í leiðandi miðbankarentum, meðan longu renturnar hækkaðu, millum annað orsakað av geopolitiskari óvissu og útlitum til lagaligan altjóða fíggjarpolitikk og stórar almennar íløgur. Yvirskipað var talan tó um vinning frá bæði realkreditt-, virkis- og menningarlandalánsbrøvum.

| Íløguslag | Miðal íløga mió. kr. | Býtið % | Avkast % | Avkast mió. kr. |
|---|---:|---:|---:|---:|
| Partabrøv | 573 | 29,0 | 7,5 | 42,9 |
| Statslánsbrøv | 13 | 0,7 | -0,7 | -0,1 |
| Realkredittlánsbrøv | 811 | 41,0 | 2,7 | 21,6 |
| Investment grade virkislánsbrøv | 93 | 4,7 | 2,6 | 2,4 |
| High yield virkislánsbrøv | 104 | 5,3 | 4,9 | 5,1 |
| Menningarlandalánsbrøv | 81 | 4,1 | 8,3 | 6,7 |
| Útlán | 53 | 2,7 | 2,8 | 1,5 |
| Alternativar íløgur | 214 | 10,8 | 2,4 | 5,0 |
| Innlán | 36 | 1,8 | 1,4 | 0,5 |
| **Íløgur tilsamans** | **1.979** | **100,0** | **4,3** | **85,7** |

*Talva 4 – Avkast í 2025 býtt á íløgusløg*

Viðvíkjandi avkasti frá virðisbrøvum er vert at hava í huga, at virðisbrævakursir sveiggja dagliga. Hækkar kursurin á einum virðisbrævi, sum grunnurin eigur, kann grunnurin fáa meira fyri tað, um tað verður selt; lækkar kursurin, fæst minni. Hetta merkir, at virðið á samlaðu virðisbrævaognini støðugt broytist, og tí sveiggjar avkastið eisini frá einum ári til annað.

Talva 5 niðanfyri vísir, at miðalavkastið frá virðisbrævaognini hjá grunninum síðani 2012 er 3,7%. Í krónum svarar tað til 50,3 mió. um árið í miðal. Flestu ár hevur talan verið um vinning, hóast okkurt árið er, sum dregur miðalavkastið niður, serliga 2022.

| Ár | Avkast % | Avkast mió. kr. |
|:---:|---:|---:|
| 2012 | 4,5 | 38,7 |
| 2013 | 2,7 | 25,9 |
| 2014 | 4,7 | 47,5 |
| 2015 | 3,5 | 38,5 |
| 2016 | 3,8 | 44,1 |
| 2017 | 4,4 | 54,8 |
| 2018 | -1,5 | -19,6 |
| 2019 | 8,5 | 113,3 |
| 2020 | 3,2 | 47,9 |
| 2021 | 6,5 | 103,3 |
| 2022 | -9,0 | -153,0 |
| 2023 | 7,6 | 121,9 |
| 2024 | 8,8 | 155,7 |
| 2025 | 4,3 | 85,7 |
| **Miðal** | **3,7** | **50,3** |

*Talva 5 – Árligt avkast síðani 2012*

Grunnurin hevur frá 1. januar 2019 havt íløgurøktaravtalu við Handelsbanken, Nordea, Nykredit og SEB. Í 2024 var íløgurøktin hjá grunninum boðin út av nýggjum, og 1. januar 2025 komu nýggjar avtalur við BankInvest, Danske Bank, Jyske Bank, Nordea, Nykredit og SEB í gildi, so tað nú eru seks íløgurøktarar. Harafturat umsitur Landsbankin eina minni lánsbrævaogn og eisini part av alternativu íløgunum fyri AMEG. Við árslok 2025 var virðisbrævaognin hjá grunninum 2 mia. kr.

## Fyrisiting

Avtala er gjørd við Landsbanka Føroya um at umsita Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Umframt at røkja fæið hjá grunninum tekur Landsbankin sær av øllum fyrisitingarligu uppgávunum hjá grunninum, tó ikki innkrevjing og útgjalding, sum TAKS tekur sær av.

## Framtíðarútlit

Hóast geopolitiskt stríð ávirkar heimsmyndina í løtuni og kann elva til búskaparligar avbjóðingar, eitt nú umvegis hægri prísstøði og minni samhandil millum lond, eru íleggjarar á fíggjarmarknaðum varliga bjartskygdir um íløguútlitini fyri 2026. Lagaligur fíggjarpolitikkur, til dømis stórar almennar íløgur í verju- og infrakervi, og vónir um framhaldandi inntøkuvøkstur hjá fyritøkum eru nakrar av orsøkunum. Harumframt rokna fleiri íleggjarar við møguligum undanvindi frá politiskum átøkum í USA, nú slík skulu setast í verk fram ímóti amerikanska miðskeiðisvalinum, sum verður seinni í ár.

Umframt spentu geopolitisku støðuna eru eisini aðrir váðar at hava í huga. Ein teirra er tengdur at stóru vónunum um vinning frá tøkniligum frambrotum, serliga innan vitlíki, og umfatandi íløgunum, sum verða gjørdar fyri at røkka hesum vinningi. Tá væntanirnar eru høgar og lutfalsliga einstáttaðar, sum tær hava verið í sambandi við vitlíki seinastu tíðina, kunnu tíðindi, ið eru verri enn væntað, ávirka marknaðirnar lutfalsliga nógv skeiva vegin.

Pengapolitikkur er somuleiðis ein óvissa og kann koma í fokus, eitt nú um prísstøðið yvir komandi tíðarskeið vísir seg at vera hægri enn væntað. Harumframt fáa høgar almennar skuldarstøður hjá fleiri av heimsins størstu tjóðum alsamt størri ans.

# Leiðsluátekning

Stýrið hevur í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025 fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við almennu roknskaparlógina.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu grunsins tann 31. desember 2025 umframt av grunsins virksemi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025.

Vit meta, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður góðkend á stýrisfundinum.

Argir, tann 18. juni 2026

**Stýrið**

| | | |
|---|---|---|
| Malan Johansen<br>forkvinna | Kristoffur Laksá | Elin Sørensen |

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

***Til stýrið í Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum***

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir almennu roknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virksemi grunsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2025 samsvarandi almennu roknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av grunninum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við almennu roknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt grunnurin megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka grunnin, steðga rakstrinum, ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

### Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, ætlað dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt grunnurin megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at grunnurin ikki er førur fyri at halda fram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslu-frágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í almennu roknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 18. juni 2026

NUMO
Góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Gert O. S. Drangastein
løggildur grannskoðari

# Upplýsingar um grunnin

| | |
|---|---|
| **Grunnurin** | Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin<br>C/O Landsbanki Føroya<br>Kvíggjartún 1<br>FO-160 Argir<br><br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember |
| **Stýri** | Malan Johansen, *forkvinna*<br>Kristoffur Laksá<br>Elin Sørensen |
| **Grannskoðan** | NUMO<br>Góðkent grannskoðanarvirki Sp/f<br>Smyrilsvegur 20<br>100 Tórshavn |

# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fyri 2025 er gjørd í samsvari við almennu roknskaparlógina og sambært §§ 13 - 15 í starvsskipanini fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

Ársfrásøgnin fyri 2025 er gjørd í donskum krónum.

**Um innrokning og virðisáseting**

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Harumframt verða virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum innroknaðar. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at grunnurin í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at grunnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skylduni kann gerast upp álítandi.

Til at byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma, áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

## Rakstrarroknskapurin

**Nettoinntøka**

Inntøka grunsins - arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið - er fyri løntakarar ásett til 3% (2019: 3%) av árligu skattskyldugu inntøkuni sambært fyribilsskattaskránni, umframt javningar av inngjøldum undanfarin ár.

Við roknskaparlok er ikki gjørligt at gera upp inntøkurnar fyri roknskaparárið endaliga, tí grundarlagið undir inntøkunum ikki er tøkt, við tað at sjálvuppgávurnar hjá persónum, sum inntøkurnar verða uppgjørdar eftir, ikki eru tøkar.

Hesar uppgerðir verða tí gjørdar í eftirfylgjandi roknskaparári. Broytingarnar eru tó ikki av eini tílíkari stødd, at tær hava týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

Fyri arbeiðsgevarar er eftirlønargjaldið ásett til 3% (2019: 3%) av árligu útgoldnu A-inntøkuni.

### Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn

Kostnaðurin fyri arbeiðsmarknaðareftirløn er lógarbundna útgjaldingin til pensjónistar í roknskaparárinum.

### Samsýningar

Starvsfólkakostnaður fevnir um samsýningar, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir fevna um kostnaðir til fyrisiting, útreiðslur til umsiting av ognum grunsins, umframt annan kostnað.

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentur, kursvinning og -tap viðvíkjandi virðisbrøvum, skuld og flytingar í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum.

### Skattur av ársúrslitinum

Grunnurin er ikki skattskyldugur.

## Fíggjarstøðan

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís.

Niðurskriving verður gjørd móti væntaðum tapi, tá ið tað verður mett at vera ein óvildug ábending um, at ein áogn ella áognarbólkur eru minkað í virði. Er ein óvildug ábending um, at ein einstøk áogn er virðisminkað, verður henda áogn niðurskrivað.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, ið eru innroknaðar sum ogn í umferð, fevna um goldnar kostnaðir viðvíkjandi komandi roknskaparárum.

### Virðisbrøv og kapitalpartar

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið fevna um børsskrásett partabrøv og lánsbrøv, verða virðisásett til dagsvirði fíggjarstøðudagin. Ikki børsskrásett virðisbrøv verða virðisásett til dagsvirði grundað á eitt roknað kapitalvirði.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv, við eini gildistíð minni enn 3 mánaðir, og sum uttan forðing kunnu vekslast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum er ótýðandi.

### Skyldur

Skyldur verða virðisásettar til nettorealisationsvirði.

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2025

| | Nota | 2025<br>kr. | 2024<br>tkr. |
|---|---|---|---|
| **Nettoinntøka** | 1 | **818.855.949** | **773.953** |
| Avseting | 2 | -991.504 | -80.396 |
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | | -728.461.180 | -713.310 |
| Aðrir uttanhýsis kostnaðir | | -3.882.275 | -3.806 |
| **Bruttoúrslit** | | **85.520.990** | **-23.559** |
| Samsýningar | 3 | -462.695 | -197 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **85.058.296** | **-23.756** |
| Fíggjarligar inntøkur | 4 | 86.109.852 | 156.480 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **171.168.148** | **132.724** |
| Skattur av ársúrslitinum | | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **171.168.148** | **132.724** |
| Flutt úrslit | | 171.168.148 | 132.724 |
| | | **171.168.148** | **132.724** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2025

| | Nota | 2025<br>kr. | 2024<br>tkr. |
|---|---|---|---|
| **Ogn** | | | |
| Áogn av sølu og tænastum | | 104.549.751 | 93.954 |
| Tíðaravmarkingar | | 63.480.226 | 60.090 |
| **Áogn** | | **168.029.978** | **154.044** |
| Virðisbrøv | 5 | 2.048.704.241 | 1.630.885 |
| **Virðisbrøv** | | **2.048.704.241** | **1.630.885** |
| **Tøkur peningur** | | **32.161.385** | **292.257** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **2.248.895.604** | **2.077.186** |
| **Ogn til samans** | | **2.248.895.604** | **2.077.186** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2025

| | Nota | 2025<br>kr. | 2024<br>tkr. |
|---|---|---|---|
| **Skyldur** | | | |
| Fluttur vinningur | | 2.167.797.159 | 1.996.629 |
| **Eginogn** | 6 | **2.167.797.159** | **1.996.629** |
| | | | |
| Onnur skuld | 7 | 81.098.445 | 80.557 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **81.098.445** | **80.557** |
| | | | |
| **Skuld tilsamans** | | **81.098.445** | **80.557** |
| | | | |
| **Skyldur tilsamans** | | **2.248.895.604** | **2.077.186** |
| | | | |
| Eventualskyldur v.m. | 8 | | |
| Veðsetingar og trygdarveitingar | 9 | | |

# Notur til ársfrásøgnina

| | | 2025 | 2024 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| **1** | **Nettoinntøka** | | |
| | Eftirlønargjald, løntakarar | 419.060.223 | 398.796 |
| | Eftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 399.795.726 | 375.157 |
| | **Nettosøla til samans** | **818.855.949** | **773.953** |
| **2** | **Avsetingar** | | |
| | Krav, Nordisk Konvention | 0 | 80.000 |
| | Sett av til tap, arbeiðsgevarar | 991.504 | 396 |
| | | **991.504** | **80.396** |
| **3** | **Lønir & samsýningar** | | |
| | Lønir | 249.768 | 0 |
| | Stýrissamsýningar | 194.348 | 188 |
| | Onnur gjøld tengd at løn & samsýning | 18.579 | 8 |
| | | **462.695** | **197** |
| | Starvsfólkatal í miðal | 1 | 0 |
| **4** | **Fíggjarligar inntøkur** | | |
| | Avkast, lánsbrøv | 42.314.002 | 57.147 |
| | Avkast, partabrøv | 39.302.063 | 95.504 |
| | Rentur, peningastovnar | 1.133.649 | 2.093 |
| | Rentur, áogn frá sølu | 284.290 | 254 |
| | Røkt | 3.075.847 | 1.482 |
| | | **86.109.852** | **156.480** |

| | | 2025<br>kr. | 2024<br>tkr. |
|---|---|---|---|
| **5** | **Virðisbrøv** | | |
| | Partabrøv | 610.999.845 | 462.633 |
| | Lánsbrøv | 1.241.853.699 | 983.754 |
| | Alternativar íløgur | 195.850.698 | 184.498 |
| | | **2.048.704.241** | **1.630.885** |

| | | Fluttur vinningur | Til samans |
|---|---|---|---|
| **6** | **Eginogn** | | |
| | Salda 1. januar 2025 | 1.996.629.011 | 1.996.629.011 |
| | Ársúrslit | 171.168.148 | 171.168.148 |
| | **Eginogn** | **2.167.797.159** | **2.167.797.159** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **7** | **Onnur skuld** | | |
| | Krav, Nordisk Konvention | 80.000.000 | 80.000 |
| | Millumrokning við landskassan | 1.098.445 | 478 |
| | Annað | 0 | 80 |
| | | **81.098.445** | **80.557** |

**8 Eventualskyldur v.m.**

Grunnurin móttók í 2019 kæru fyri undantak at rinda AMEG-gjøld, tí sosial gjøld vera goldin aðrastaðni í tráð við Nordisk konventión. Frá 1. januar 2019 er undantak heimilað í AMEG-lógini. Ivamál hevur tó verið, um grunnurin skuldi endurrinda AMEG-gjøld aftur í tíð.

Í 2023 tók Eystari Landsrættur avgerð til fyrimunar fyri teir, ið høvdu kært Heilsutrygd fyri at krevja heilsutrygdargjald frá persónum, sum sambært Nordisku konventión ikki skulu rinda sosial gjøld í tveimum londum, tá rættur bert er til útgjald í øðrum landinum. Eftir hesa dómsavgerð, vendi stýrið sær til Fíggjarmálaráðið við spurninginum um, hvussu grunnurin skuldi fyrihalda seg. Stýrið fyri grunnin metti, at av tí at tað er TAKS, sum krevur gjøldini inn, var tað TAKS og Fíggjarmálaráðið, ið høvdu tulkingarrættin. Sambært Fíggjarmálaráðnum er ætlanin at brúka sama modell sum fyri Heilsutrygd. Neyðugt verður at broyta lógina fyri arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Í 2024 tók stýrið avgerð um at innrokna ta upphædd, sum TAKS hevur roknað fyri tíðarskeiðið 2014 og frameftir, at grunnurin kann koma at rinda út aftur. Talan er um 80 mió.kr.

Aðrar eventualskyldur eru ikki.

## 9 Veðsetingar og trygdarveitingar

Ongar ognir hjá grunninum eru veðsettar, og ongar trygdir eru veittar.